## Ungt og óroynt landslið

Av teimum 22 leikarunum, Brian Kerr hevur boðsent, eru 11 teirra undir 25 ár. Harumframt hava 12 teirra spælt sjey landsdystir ella færri. Av teimum meiri royndu eru tíggju, ið hava spælt fleiri enn tíggju landsdystir. Millum teirra er toppskjúttin í hópinum hesaferð Fróði Benjaminsen. Nú Rógvi Jacobsen ikki er við, er hann tann leikarin, ið hevur fingið bóltin oftast í netið – tríggjar ferðir. Fýra hava skotið tvey mál og hesir eru Christian Lamhauge Holst, Christian Høgni Jacobsen, Jákup á Borg og Súni Olsen.





Randi Kúrberg, sum her roynir seg í longdarlopi leygardagin, megnaði tá eisini at seta nýtt føroyskt met í einari av hinum greinunum, sleggjuvarpi, tá hon fyri fyrstu ferð kom út um 40 metrar

Mynd: Hvirlan

# Randi tók metið

**Hóast umstøðurnar leygardagin ikki vóru tær bestu, megnaði Randi Kúrberg at seta einasta føroyska metið í FM-kappingini í frælsum ítrótti, tá hon varpaði sleggjuna út um teir 40 metrarnar**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Um vikuskiftið var kappast í tilsamans níggju greinum hjá kvinnum og monnum, tá FM-kapping í frælsum ítrótti var á Tórsbreyt. Leygardagin var veðrið keðiligt, men sunnudagin var hinvegin av allarfagrasta veðri, so tað var undir sera ymiskum umstøðum, at kappast var hesar báðar dagarnar.

At veðrið leygardagin ikki var av tí besta, forðaði tó ikki fyri, at tað eydnaðist einum íðkara, Randi Kúrberg, at seta nýtt føroyskt met í sleggjuvarpi, tá hon í aðru av fimm royndum fekk varpað sleggjuna út á 40,46 metrar.

– Eg kann bara lata væl at, tí eg setti met, og hetta var eisini tað, sum eg vildi í ár, at sleppa út um 40 metrar. So var tað bara rotið, at tað ikki var á Oyggjaleikunum, tá eg var beint niðan fyri 37 metrar. Í fjør setti eg met til FM við 39,79 metrum, so teir 40 metrarnir hava ligið og lúrt har. Hetta var eitt slag av einum marknasteini, sum eg vildi sleppa framvið, sigur Randi Kúrberg.

– Vit hava enn ikki fingið sett nøkur merki á Tórsbreyt, sum vísa, hvar metini eru, men Heri Ziska hevði sett fløgg upp, har sum metlongdirnar vóru, og tí sá eg, at sleggjan eg fór út um tað. Eg helt annars ikki, at kastið var serliga gott. Tað var tekniskt gott, men eg helt, at tað kundi verið meira ferð á. So eg seti mítt álit á, at eg klári longur enn hatta.

### Vert súru løturnar

Randi Kúrberg heldur, at tað, at veðrið ikki var til vildar leygardagin, ikki sá út til at ávirka so nógv í kastigreinunum, og hon vísir millum annað á, at umframt hennara met, so hevði Heri Ziska eina góða sleggjukapping, har hann rakk næstan fýra metrar longri enn á Oyggjaleikunum í Álandi fyri einum mánaði síðani.

– Eisini Meifríð Weihe Hansen kom í nánd av sínum persónliga meti, umframt at fleiri av teimum ungu og nýggju settu persónlig met, so tað gongur tann rætta vegin. Illveður og regn er eftir øllum at døma nakað, vit trívast væl í, sigur Randi, sum kortini heldur, at hetta er vert tær súru løturnar og alt stríðið undir venjing:

– Vit liggja og knossa fleiri tons um vikuna í Yndi, umframt at vit standa úti í regni og kulda og draga sleggjuna gjøgnum krapa, men tað er avgjørt tað vert, tá tú so fært úrslitini afturfyri.

## FM í frælsum ítrótti

*1. og 2. august 2009 á Tórsbreyt*

**100 metra renning, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Mona Breckmann | 1991 | Bragdið | 13,96 |
| 2 | Rebekka Fuglø | 1993 | Treysti | 14,55 |
| 3 | Randi Kúrberg | 1972 | Hvirlan | 16,43 |

**100 metra renning, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið | 0,00 *) |
| 2 | Robin Jönsson | 1990 | Roysnið | 0,01 |
| 3 | Júst í Túni | 1986 | Bragdið | 0,51 |
| 4 | Jimmy Jönsson | 1991 | Roysnið | 0,94 |

**) Vegna tekniskar trupulleikar vóru ongar tíðir*

**400 metra renning, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Rebekka Fuglø | 1993 | Treysti | 66,89 |

**400 metra renning, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Bragdið | 54,92 |
| 2 | Robin Jønsson | 1990 | Roysnið | 57,92 |
| 3 | Júst í Túni | 1986 | Bragdið | 58,26 |
| 4 | Djóni Højgaard | 1988 | Bragdið | 59,74 |
| 5 | Tummas Kjærbo | 1988 | Treysti | 63,63 |
| 6 | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið | 63,74 |

**800 metra renning, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Rebekka Fuglø | 1993 | Treysti | 2.32,45 |
| 2 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið | 2.34,64 |

**800 metra renning, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Bragdið | 2.07,77 |
| 2 | Júst í Túni | 1986 | Bragdið | 2.12,46 |
| 3 | Djóni Højgaard | 1988 | Bragdið | 2.22,09 |

**5.000 metra renning, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið | 18.30,12 |
| 2 | Borgarhjørt Holm | 1966 | Bragdið | 20.10,86 |

**5.000 metra renning, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Sam Vang | 1970 | Bragdið | 16.33,28 |
| 2 | Andrias Hansen | 1982 | Bragdið | 16.44,90 |
| 3 | Hallur Holm | 1967 | Bragdið | 17.17,42 |
| 4 | Henry Olsen | 1964 | Bragdið | 17.17,89 |
| 5 | Eirikur Hansen | 1980 | Bragdið | 17.21,93 |
| 6 | Jonhard Larsen | 1966 | Treysti | 18.26,22 |
| 7 | Tummas Kjærbo | 1988 | Treysti | 19.00,15 |
| 8 | Hanus Højgaard | 1960 | Bragdið | 19.52,02 |
| 9 | Robert Vilhelmsen | 1951 | Bragdið | 22.48,45 |

**Longdarlop, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Mona Breckmann | 1991 | Bragdið | 4,32 |
| 2 | Randi Kúrberg | 1972 | Hvirlan | 3,88 |
| 3 | Meifríð Weihe Hansen | 1978 | Hvirlan | 3,38 |

**Longdarlop, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið | 5,69 |
| 2 | Djóni Højgaard | 1988 | Bragdið | 5,48 |
| 3 | Helgi Geyti | 1993 | Hvirlan | 4,90 |

**Sleggjuvarp, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Randi Kúrberg | 1972 | Hvirlan | 40,46 *) |
| 2 | Meifríð Weihe Hansen | 1978 | Hvirlan | 22,16 |

**) føroyskt met*

**Sleggjuvarp, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Heri Ziska | 1967 | Hvirlan | 44,26 |
| 2 | Uni Højgaard | 1980 | Hvirlan | 29,21 |
| 3 | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið | 14,97 |

**Klingruvarp, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Meifríð Weihe Hansen | 1978 | Hvirlan | 25,64 |

**Klingruvarp, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Heri Ziska | 1967 | Hvirlan | 39,28 |
| 2 | Helgi Geyti | 1993 | Hvirlan | 22,81 |

**Spjótkast, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Randi Kúrberg | 1972 | Hvirlan | 31,75 |
| 2 | Eyðdis Andreasen | 1972 | Hvirlan | 15,84 |

**Spjótkast, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Høgni Debes | 1972 | Hvirlan | 38,35 |
| 2 | Robin Jönsson | 1990 | Roysnið | 35,88 |
| 3 | Helgi Geyti | 1993 | Hvirlan | 35,58 |
| 4 | John Egholm | 1961 | Hvirlan | 35,02 |
| 5 | Ólavur Egholm | 1992 | Hvirlan | 33,57 |
| 6 | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið | 26,72 |

**Kúluvarp, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Randi Kúrberg | 1972 | Hvirlan | 8,10 |
| 2 | Eyðdis Andreasen | 1972 | Hvirlan | 6,64 |

**Kúluvarp, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Høgni Debes | 1972 | Hvirlan | 9,82 |
| 2 | Heri Ziska | 1967 | Hvirlan | 9,74 |
| 3 | Kristian Martin Garðalíð | 1990 | ÍSB | 8,67 |
| 4 | John Egholm | 1961 | Hvirlan | 8,37 |
| 5 | Robin Jönsson | 1990 | Roysnið | 8,15 |
| 6 | Helgi Geyti | 1993 | Hvirlan | 7,20 |
| 7 | Ólavur Egholm | 1992 | Hvirlan | 6,42 |